Jens M. Poulsen, skrivstovustjóri um momsin:

Fólk verða trýst út í svart arbeiði

-Momsurin fer at sindra innlendis viðurskifti av hesi avskriftini av eini danskari momsskipan, sum als eingin orsøk var fyri at fremja, sigur skrivstovustjórin í Tórshavnar Býráð, Jens M. Poulsen. Hann roknar við, at momsurin gevur landskassanum millum 400 og 500 milliónir í eykainntøku, og tað er vanliga húsarhaldið, sum rindar

-Løgtingið hevur endaliga samtykt eina momsskipan lík teirri, teir hava í londum við 47 milliónum íbúgvum, og sum er heilt óneyðug í einum so einføldum samfelagi sum okkara við okkara 47.000 sálum.

Hetta sigur Jens Marius Poulsen, skrivstovustjóri í Tórshavnar Kommunu. Hann heldur, at skipanin er alt annað enn einføld, og tað fer eisini at vísa seg.

-Vit hava illa nokk fólk at líkna verandi skatt, og enn minni at krevja gamlan skatt inn. Hvussu skulu vit nú hava orku og ráð til at umsita eina skipan sum hesa, spyr skrivstovustjórin. Hann sigur seg ikki ivast í, at ein av avleiðingunum verður, at fólk verða tvingað út í svart arbeiði.

-Trýstur tú fólk so mikið, at tey føla, at tey ikki orka meira, so fært tú eitt móttrýst. Og hetta fer eisini at vísa seg. Tað verður skipanin, sum spælir fallitt, og ikki fólkið, sigur Jens M. Poulsen.

Brúkarin rindar

Orsøkin til, at vit hava fingið moms er ivaleyst tann, at vit fáa eitt breiðari avgjaldsgrundarlag, sum gevur fleiri krónur í landskassan. Útflutningsvinnan gerst avgjaldsfrí, og vanliga húsarhaldið fær rokningina, sigur Jens M. Poulsen, sum roknar við, at momsurin fer at geva landskassanum millum 400 og 500 milliónir í meirinntøku.

At útflutningsvinnan fær betri sømdir heldur Jens M. Poulsen kortini vera einasta rætta, og skuldið verið gjørt fyri mongum árum síðani, men hann ávarðar ímóti harvið at leggja ov stórar byrðar á fólkið. Landið má ikki brúka meira enn verulig ráð eru til, og fólkið orkar at bera. At fíggjarmálaráðharrin vil nýta hesar milliónir til at gjalda skuld aftur við, er í fínasta lagi.

Setið ikki lønirnar niður

-Men tað harmar meg at hoyra fíggjarmálaráðharran og aðrar, millum annað nú løgmansrøðan var til viðgerðar, tosa um lønarniðurskurð. Hetta gera teir eftir at landsstýrið hevur lagt fleiri avgjøld á fólk, harvið lætt landskassan fyri byrðar, millum annað við arbeiðsloysisstuðli og samhaldsfasta, og nú tey fáa momsin oman á tað heila. Ein lønarniðurskurður í sær sjálvum loysir einki vandamál. Tað eigur at snúgva seg um at virkið fær nakað fyri ta løn, fólkið fær.

-Haldið sáttmálabundna løn, og so má virkis- og stovnsleiðslan syrgja fyri, at starvsfólkið ger arbeiðið fyri lønina, sigur Jens M. Poulsen.

tór.-



-Vit kundu saktans líkastilla vørur, innfluttar úr EF, við føroyskar, uttan eina so byrokratiska skipan, sum momsurin er, heldur Jens M. Poulsen, skrivstovustjóri á býráðsskrivstovuni

Mynd: Kalmar



Vilhelm Johannesen, formaður í Skattanevndini:

Roknaðu ikki við at húsarhaldið skuldi gjalda meira

Eftir at landsstýrið hevði lagt uppskotið um moms fyri løgtingið, vað tað beint í Skattanevndina, sum hevur havt fleiri fundir um, og drúgva viðgerð annars av uppskotinum.

Vilhelm Johannesen, formaður í Skattanevndini sigur, at nevndin hevði nakrar útrokningar at halda seg til. Hesar vístu, at í 1990-prísum fekk landskassin 13 milliónir í meirinntøku í samband við momsin.

Í álitinum frá Skattanevndini til løgtingið sigur nevndin seg ivast í hesum tali, og heldur tað møguliga vera ov høgt sett, tí nýtslan er nakað minni nú enn hon var fyri tveimum árum síðani.

-Tá stórt sæð sama krónutal kemur í landskassan, og vit fáa at vita, at nakrar vørur gerast bíligari og aðrar dýrari, kundu vit bert roknað við, at hetta fíggjarliga fór at uppviga hjá vanliga húsarhaldinum, sigur Vilhelm Johannesen.

tór.-

Vilhelm Johannesen roknaði ikki við, at momsurin fór at dýrka um hjá vanliga húsarhaldinum

Visti tú...
...at SMS FOTO hevur eina
Canon
lit-kopimaskinu, sum m.a. kann:
vaksa um myndir upp í A3 stødd ella størri?
SMS FOTO
Tlf. 19820

